HB-VB 2-1 (0-1):

# Vágbingar kendu seg snýttar

**Fyri nógv tað mesta hevði VB yvirvágina í Gundadali sunnudagin, men við tveimum málum, sum vágbingar ikki vóru serliga fegnir um, fekk HB kortini stigini, soleiðis at meistararnir enn hava møguleikan at gerast meistarar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað líktist einum avgreiðsluspurningi hjá meistarunum, tá VB vitjaði í Gundadali sunnudagin. Ikki tí. Vágbingar hava ofta argað HB í Gundadali, men fortreytirnar hjá gestunum vóru avgjørt ikki tær bestu. Botnstríðið hevur gjøgnum alt árið tikið nógv av sjálvsálitinum úr VB-liðnum, og við týdningarmikla spælskiparanum, Milan Kulic, á skaðalistanum, mundu tey fægstu roknað við nøkrum skreytum frá teirra síðu. Nakað sum eisini fekk NordicBet at taka dystin av listanum yvir føroyskar dystir, sum veddarar kundu spæla uppá.

### Fylgdu taktiska upplegginum

Men vágbingarnir vildu tað tó øðrvísi. Móti einum HB-liði, sum gott nokk manglaði Hall Danielsen og Kára Nielsen, stríddust teir frá fyrsta bríksli manniliga. Stórur dentur varð lagdur á at halda verjuskipina, og tá Poul N. Poulsen eftir gott uppspæl í vinstru kundi leggja gestirnar framum, vóru fortreytirnar fyri kontra-spælinum enn betri.

HB hevði at kalla ikki nakran veruligan málmøguleika fyri steðgin, og fyrstu løtuna eftir steðgin var lítið frægari í so máta. Undan vindinum royndu teir seg onkra tíð við langskotum, men Bjarni í VB-málinum hevði ikki stórvegis trupulleikar av hesum, og so líðandi mundi tað gerast greitt fyri fleiri, at ein sensatión væl kundi vera ávegis.

Og ivaleyst man hvør tann einastai av VB-spælarunum eisini halda, at hendan skuldi verið komin til høldar. Í øllum førum vóru bæði málini hjá HB av tí slagnum, sum førdi nógv mótmæli við sær. Fyrst fór Vagnur Mohr Mortensen um koll í brotsteiginum, og hóast mótmæli, so varð brotsspark dømt. Hetta umsetti Vagnur sjálvur til mál, og so royndi HB at trýsta enn meira.

Innskifti Uni Arge gav eisini nakað av tiltrongdari rástyrki í álopspartinum, men tað var tó ikki hann, sum gjørdist dagsins maður í HB hendan dagin. Hans á Lag hevur fyri tað nógva verið nýttur í álopinum í ár, men eftir skaðasteðg byrjaði hann hesa ferð á miðverjuplássinum, har flestu áskoðararnir kennast best við hann.

Men útgangsstøðið í verjuni hevur tó ongantíð forðað Hans í at gera mál, og tað gjørdi tað heldur ikki hesaferð. Seinastu løtuna varð luftsterki spælarin fluttur niðan í álopið, og í yvirtíðini eydnaðist honum eisini at skora. Mong mundu halda, at talan var um rangstøðu, tá Uni Arge stútaði bóltin niður, men floytan tagdi, og so var Hans ivaleysur.

Ein keðilig vend fyri VB, og hon gjørdist ikki minni keðilig av, at teir beint undan hesum høvdu sín møguleika at avgera. Men ta ferðina brast bólturin stólpan, tá Nenad smekkaði til, og tað er kanska munurin millum eitt odda- og botnlið.

### Eldur í botnstríðnum

Fyri vágbingarnar mundi hetta kunnast sum meira enn snópisligt, nú teir so leingi høvdu spælt í minsta lagi upp við meistararnar. At TB so eisini vann sín dyst á Sevmýri mundi ikki betra um lagið í so máta, og nú er av álvara farið at brenna undir teimum. Bara tvey stig eru nú niður til aftasta sessin í deildini, og við einum útidysti á Sevmýri eftir á pappírinum, er av álvara lagt upp spenning í botninum. Ein spenning, sum vágbingar helst gjarna vildu verið fyriuttan.

HB hevði hinvegin alla orsøk at fegnast. Teir megnaðu enn einaferð at sýna eyðsýndu dygdina hjá einum oddaliði. Nevnliga at fáa øll stigini, tá spælið als ikki koyrir upp á tað besta. Og so munnu bæði viðhaldsfólk og spælarar leggja vertin á, at maskinan ikki koyrdi so væl hesaferð. Tað eru stigini, sum telja, og tá árið verður gjørt upp, er tað eingin, sum spyr, hvussu liðini hava spælt. Tað eru stigini, sum telja, og hesi staðfesta, at HB enn er væl og virðiliga við í gullstríðnum.



*Í Edvard Ble átti VB helst besta spælaran á vøllinum, men á máltalvuni munaði hetta kortini lítið, tá alt kom til alt*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## FAKTA UM DYSTIN

**HB-VB 2-1 (0-1)**
0-1: Poul N. Poulsen, 28.
1-1: Vagnur M. Mortensen (br.), 68.
2-1: Hans á Lag, 90.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**HB:** Bárður Johannesen - Rani D. Christiansen (Bárður Mortansson, 76.), Rasmus Nolsøe, Hans á Lag, Janus M. Joensen - Vagnur M. Mortensen, Rúni Nolsøe, Svenn F. Jacobsen (Uni Arge, 64.) - Jákup á Borg, Tór-Ingar Akselsen (Hendrik Rubeksen, 42.), Rókur Jespersen
**GK:** Jákup á Borg, 62.
**VB:** Bjarni Johannesen - Mortan úr Hørg, Suni úr Hørg, Anders Sørensen, Jákup Olsen - Birni Kjærbech (Jakob Skaaning, 76.), John Poulsen (Jón K. Poulsen, 37.), Edvard Ble, Pól N. Poulsen - Nenad Stankovic, Dan Djurhuus
**GK:** John Poulsen, 12., Edvard Ble, 31.

# Verjuskansin avgjørdi

**Hóast hann nú aftur er partur av HB-verjuni, so dugir Hans á Lag framvegis at skjóta avgerandi málini**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Hann hevði hug at flenna, tá vit eftir dystin spurdu, hvørt tað nú var soleiðis, at hansara rætta pláss var í álopinum.

- Tað veit eg ikki. Eg trívist fult so væl í verjuni, men eg vildi í øllum førum skora, tá eg fór niðaneftir. Og tað eydnaðist so eisini, helt Hans á Lag.

Spurdur um dystin, var hann skjótur at staðfesta, at hetta nokk ikki var tann besti dysturin, sum HB hevur spælt í ár.

- Vindurin órógvar kanska nakað, men tað er líka fyri báðar partar. Í øllum førum, so spæla vit ikki serliga væl, og tá teir so skora eftir eitt mistak frá okkara síðu, verður tað ógvuliga tungt. Men eg haldi kortini, at tað eigur at vera givið okkum sum rós, at vit alla tíðina stríðast fyri møguleikanum.

*Tað er kanska eisini eitt úrslit av, at tit eru vanir at vinna. Hetta at tit eisini í mótgongd trúgva upp á møguleikan?*

- Ja, tað er tað kanska. Vit royna í øllum førum alla tíðina, og so vóna vit, at úrslitið kemur.

Um tey bæði málini, sum vágbingarnir vóru sera ónøgdir um, segði Hans, at hann dugdi illa at meta um rættleikan av hesum.

- Tá brotssparkið varð dømt, stóð eg rættiliga langt burturi, men eg helt tó, at tað var kontakt millum spælararnar. Um eg var rangstaddur sjálvur, tá eg skoraði, skal eg ikki siga. Men eg var í framdrifti, tá Uni stútar bóltin, og tí havi eg kanska eisini verið langt innanfyri, tá bólturin so er komin til mín.

- Og so kann eg bara leggja afturat, at eg ikki eri so keddur av tí, um hatta málið skuldi verið kolldømt. Tí hasir dómararnir kolldømdu í øllum førum eitt mál hjá mær fyrr í ár, tá eg var í minsta lagi 10 metrar onside, so tú kanst gott siga, at teir skyldaðu mær tað, ljóðaði heldur speiska viðmerkingin at enda.

Við hesum seinasta verður sipað til dystin, sum HB spældi móti GÍ fyrr í ár. Tá varð eitt mál hjá Hans púrasta óskiljandi kolldømt, hóast tað neyvan var nakar annar enn linjudómarin, sum helt talan vera um rangstøðu.

Tað er tó einki at ivast í, at málið hesa ferð kom betri við, enn tað hevði komið móti GÍ, og sum Hans sjálvur tekur til, so er tað nú finala hvørja ferð.

- Vit mugu bara taka ein dyst í senn. Tann næsti verður í Fuglafirði, har trý stig bíða eftir okkum, og so mugu vit bara alt tað, sum vit megna, fyri at taka hesi. Longri fram enn tað sama vil eg ikki hugsa í løtuni, ljóðaði staðfestingin.

# Nú verður tungt

At vágbingarnir vóru nipnir eftir dystin sunnudagin, er sjálvsagt.

- Har vórðu vit snýttir so dyggiliga. Sjálvur haldi eg, at hetta var ræðuligt fyri okkum, og dømingina kunnu vit undir ongum umstøðum verða nøgdir um, helt Mortan úr Hørg eftir dystin.

Um tey bæði málini hjá HB segði Mortan, at nú hevði hann sjálvandi til góðar at síggja tey í sjónvarpinum, men hann helt tó, at talan í báðum førum var um sera ivasamar dómar - ella mangul upp á sama.

- Men nú verður tað tungt hjá okkum. NSÍ kemur á vitjan næstu ferð, og tann dysturin skal helst geva nakað, um vit ikki skulu til Sevmýri at spæla ein altavgerandi dyst, og tí vilja vit fegnir sleppa undan. Hinvegin haldi eg, at vit hesa ferð sýndu tann hugburðin, sum krevst, og megna vit at halda fast um hetta, samstundis sum vit eisini fáa Milan aftur á liðið, so rokni eg heilt avgjørt við, at vit kunnu taka stig frá runavíkingunum, staðfesti Mortan at enda.

**-mørk**

# Altjóða uppgáva í Noreg

Um eina viku fara Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen til Noregs, har teir skulu undir sína fyrstu uppgávu sum altjóða dómarar

Dysturin, sum teir báðir skulu døma, er í øðrum umfari av Europa-Cup kappingini fyri steypavinnarar, og er talan um dyst millum norsku og Kypriotisku steypavinnararnar.

Teir báðir vóru annars eisini og dømdu í Aalborg, tá Nøvling-Cup var á skránni herfyri. Sum skilst, so vóru nakrar misskiljingar tá íkomnar, soleiðis at teir báðir tveir teir fyrstu dagarnar dømdu dystir, sum lítið og einki høvdu upp seg, men sum kappingin leið, fingu teir tó tillutað alt størri uppgávur. Og skoðsmálið frá starvsfeløgunum har var, at teir skuldu vera meira enn væl komnir aftur, um teir høvdu hug at aftur, tá nýggj kapping er á skránni um eitt ár.

**-mørk**

# Einkulstartur fyri børn

**Leygardagin 1. oktober sleppa børn at royna seg í einkulstarti. Kappast verður sum hini árini í bólkunum 1, 2 og 3**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Seinasta kapping í hesum kappingarárinum er á skránni komandi leygardag, og tað verða børnini sum enda kappingarárið 2005.

Leygardagin sleppa børnini at royna seg í einkultstarti, og eins og í fjør verður kappast inni á Kaldbaksbotni.

Allir súkklarar møtast við bussskýlið í Kaldbaksbotni, har starturin verður. Koyrt verður móti Kaldbaksbygd, har vent verður.

Teinarnir eru ymiskir, alt eftir hvørjum bólki børnini koyra í.

Kappast verður í hesum bólkum:
Bólkur 1 - gentir undir 8 ár
Bólkur 1 - dreingir undir 8 ár
Bólkur 2 - gentir 9-11 ár
Bólkur 2 - dreingir 9-11 ár
Bólkur 3 - gentir 12-14 ár
Bólkur 3 - dreingir 12-14 ár
Kappingin byrjar kl. 14.00 og allir luttakarar skulu møta í seinasta lagi kl. 13.30.

Heiðursmerkir verða til tríggir teir fremstu súkklararnar, og eitt hvørt leskiligt verður til børnini eftir kappingina.